The Who siga farvæl



Fyrsti partur av ætlaðu ferðakonsertini hjá The Who varð framførd í Toronto í Kanada í desember mánað 1982. Hon skuldi halda fram í Eruopa, men kom ongantíð so langt, tí tónleikabólkurin fór í upploysing. Korsertin í Toronto gjørdist tí ein varði á genum innan rocksøguna. The Who-fólkini stava frá arbeiðarabýlingi í London. Tónleikabólkur teirra varð stovnaður fyri 20 árum síðan. Eingin tónleikabólkur hevði eins og teir nýtt so stórar forsterkarar eins og teir fóru um tónleikaførini uttan virðing. Ikki óvanligt var tað, at teir endaðu framførslurnar við at oyðileggja tónleikaljóðførini. Virðingin fyri samfelagnum var eins lítil — eitt nú lótu teir Union Jack seyma um til klæðir, sum teir lótu seg í á pallinum.

Áðrenn 60-ini vóru farin afturum bak, hevði The Who broytt enska rock-tónleikin og luttikið á altjóða rockfestivalum eitt nú í Woodstock og Monterey. Eisini kend sjónleikarhús høvdu boð eftir The Who. Teir gjørdu rockoperuna »Tommy« og seinni »Quadrophenia«, sum báðar eru gjørdar til film. The Who hevur gjørt dokumentarfilm um teirra tónleikaliv, sum kallast »The Kids are allright«. Filmurin sýnir brályndið og snarsinnið, sum best kemur til sjóndar, tá tónleikabólkurin framførdi á pallinum frammanfyri stórum áskoðarafjøldum.

SV-aktuelt — aftanfyri hóttanina

Hetta er sending í trimum pørtum um viðurskiftini millum Sovjetsamveldið og USA.

Ein lærari í Sovjet biður næmingar í 1. flokki tekna eitt amerikanskt barn. — Teknið hvat fellur tykkum í huga, tá tit hugsa um børn í USA, sigur lærarin.

Ein sjey ára gamal drongur teknar ein sovjettiskan hermann, sum verjir markið móti figgindanum.

Ein amerikanskur lærar biður somuleiðis børn í 1. flokki í USA um at tekna eitt sovjettiskt barn. Ein sjey ára gamal drongur teknar tveir hermenn, sum berjast — ein amerikumann og ein sovjettborgara.

Hetta eru tvey dømi, sum danska SV-aktuelt vísger í sendingini »Aftanfyri hóttanina«, sum er gjørd í samstarv við svenska og norska sjónvarpið. Sendingin prógvar, hvussu lítið fólk í USA og Sovjet vita um hvørt annað. Tey hava nærum bert prentmyndir at halda seg til, tá tað snýr seg um vitan um menniskjuni hinumegin jarntjaldið og umvent.

Í sendingini ferðast vit í USA og Sovjetsamveldinum, har upptøkur eru gjørdar av gerandisdegnum í báðum londum. Vit síggja kut úr: skúlaundirvísingini, brúdleyp, fund har gamlir hermenn hittast, landbúnaðararbeiði o.s.fr.

Eyðkenni fyri sendingarnar er, at eingir kendir persónar eru við í sendingini, men ístaðin verður roynt at finna framt til vanliga amerikanaran og sovjetborgaran og vitan teirra um hvønn annan.

Tað er framhaldandi hugsan hjá øllum, at friðurin skal varðveitast. Amerikanarar og sovjetborgarar eru sannførðir um, at borgararnir í hinum samfelagnum, ynskja frið. Kortini fevnir álitið ikki um stjórn og samfelagsskipan í landinum, — hvør síni megin.



James Joyce 3(3)

»Ulyssses« var skaldsøgan um ein dag í Dublin. »Finnegans Wake« er skaldsøgan um eina nátt í býlinginum Chalepizod við Liffey ánna. Hetta er ein droymandi søga, sum førir lesaran inn í undirvitskuna hjá tí sovandi frásøgumanninum.—

Í 3. og sístu sendingini um James Joyce verður í innihaldi sagt frá arbeiðnum hjá rithøvundanum, tá hann skrivaði hetta verk, sum veruliga er ógjørligt at umseta til onnur mál.

Sendingin er eisini um James Joyce sum privatpersón, har fólk ið kendu hann, greiða frá.

Foreldraroyndir

Hetta var so dagur í viku, tá vit fingu tíðindini tveir fylgjandi dagar, ístaðin eina langa sending fríggjakvøld. Tað er nóg mikið, um tað kann prógvast, at uttanlandstíðindini eisini verða tikin upp. Sjónvarpstíðindini byrja nú at fáa »eitt andlit« og er á tekniska økinum meira dygdargóð enn aðrar sendingar higartil hava verið.

Í sendingini »Gestakafein« sóu og hoyrdu vit so Anniku Hoydal siga dønum frá føroyskum viðurskiftum, sum vóru viðgjørd í teimum sangum og vísum, sum hon framførdi. Tað er so løgið fyribrigdið, at hoyra ein persón siga frá landi sínum, við eygum, sum hon um viðurskiftini í Danmark, veit frá at siga, so áskoðarin skilir tað.

Framførslan var góð og Annika Hoydal hevði tamarhald á sær sjálvum og tónleikarunum. Tá »Nú eru kvøldini...« kom á skermin, krimpaði tú kortini tærnar, at hoyra og síggja beinasveiggj og nærum eitt skriggj, sum var innlagt fyri at sýna dønum rætta lagið í vísuni. Slíkt listinlært tvætl er ikki neyðugt. Bara nú ikki danir halda, at soleiðis eigur vísan at verða framførd!

Onnur áhugaverd sending í vikuskiftinum var um ófødda barnið í móðurlívi, sum skuldi gjøgnum so nógvar royndir, til tess at foreldrini vóru nøgd. Eg dugi í hvussu so er ikki at ímynda mær, at eitt barn verður harmoniskari av, at pápin syngur fyri »búkinum á mammuni«... heldur ikki »Kom mai du søde milde...« Tá mamman so kemur á skermin og sigur frá sera fittu døtrum sínum, og at hon hevði ført dagbók yvir, hvussu lyndi teirra var, longu áðrenn tær vóru føddar, so haldi eg at Joachim Jerrik, tilrættisleggjari, fór ov lætt um slíkt kensluborið innihald, sum ein føðing er fyri mammu og barn, umframt pápan — sjálvsagt!

Nógv vatn er runnið á ánni, síðan Semmelweiss, lækni, í Ungarn, fann fram til orsøkina, at so nógvar kvinnur doyðu í barsilssong, tí tær fingu sjúkuna barsilsfepur. Hetta var bruni í lívmóðrini, sum breiddi seg til likamið hjá mammuni, um blóðrenslið. Hann grunaði yvir, hví mammur, sum áttu í rennunum uttanfyri sjúkrahúsið ikki fingu barsilsfepur, tá mammur á skjúkrahúsinum fingu tað. Tær fingu brunan av bakteriunum á sjúkrahúsinum. Orsøkin var reinføri, sum tá ikki varð tikið so hátíðarligt. Tá hildu teir serkønu, at Semmelweiss var sinnissjúkur. Hann gjørdist tað eisini, tí eingin gav honum viðhald. Fyri at prógva, at hann hevði rætt, skar hann seg í hondina og koyrdi tilfar av bruna í sárið. Hann doyði av barsilssjúku!

Nógv skulu børnini gjøgnum, — tað vita vit, men nærum at krevja at tey skulu hava toknir fyri at foreldrini skulu verða nøgd, (føðast undir vatni), tað er ov mikið. Tá pápin og mamman liggja í stóra baðikarinum og »føða«, kundi ein hugsað sær, at reinføri ikki er so stórt, sum neyðugt er, fyri at mamma og barn skulu koma heilskapað frá føðingini.

Áður áttu vit børn, tí vit ikki høvdu fyribirgjandi evnir. Í dag gera foreldrini av, nær tey vilja hava børnii. Tey stinga sjálvi kósina út. Tað er avgjrt ein bati, í mun til áður. Men tá barsilsferðin at kalla gerst ein handilslig roynd, har allir møguleikar su eru, skulu trótast, so sýnist tað sum er barnið bert ein statistur í lívinum hjá foreldrunum. Hugsandi er, at tá foreldur gera so nógv burturúr, so vilja tey framleiða eina góða vøru, og har kemur so barnið inn. Um tað nú ikki lúkar krøvini, sum foreldrini seta til tað? Tað er at vóna, at foreldrini ikki — eisini eftir at barnið er føtt, seta krøv til tað, við royndum av líknandi slag, ið tey »føðandi« hava lagt kropp til...

Dagny Joensen

FARVE